# MTV kvøld í REX

Fríggjakvøldið fara báðir føroysku MTV bólkarnir á pall í REX í Havn: Makrel, sum vunnu hyggjaraatkvøðurnar í MTV Samsung Nordic Unsigned, og The Dreams, sum í gjár komu víðari í annað umfar í sendirøðini "A Cut" sum gongur á MTV í løtuni.

Makrel er júst komnir aftur av ferð síni til Noregs, har teir hava spælt á einum festivali og á onkrum spælistaði. Teir vóru eisini í upptøkuhøli og spældu eina nýggja fløgu inn.

**nud**

# Varandi høgir oljuprísir

Í seinasta tíðindabrævi sínum sigur Kaupthing tað vera mest sannlíkt, at høgu oljuprísirnir eru komnir fyri at verða

Bara í ár eru prísirnir á olju hækkaðir nærum 60%, og tó at ein partur av hesum kann stava frá spekulatión, so metir Kaupthing ikki, at hetta hevur havt nakra stórvegis ávirkan.

*- Útlit eru ikki fyri, at OPEC ella aðrir oljuframleiðarar fara at framleiða munandi meir í bræði, og sannlíkt er at eftirspurningurin fer at hækka. Tí meta vit, at meiri sannlíkt er, at oljuprísurin fer at hækka heldur enn lækka av álvara komandi hálva til heila árið, hóast einstakar lækkingar á 20%-30% kunnu koma fyri í styttri tíðarskeið, verður staðfest í tíðindabrævinum.*

**-mørk**

# Terji í Café Natúr

Hóskvøldið og fríggjakvøldið spælir ein av fólkakærastu føroysku sangarunum Terji Rasmussen unplugged konsertir í Café Natúr. Terji spældi saman við Eyðun Nolsøe eina av bestu konsertunum á Summar Festivalinum.

Terji hevur í summar staðið á palli saman við Føstufressum, tá vóru millum øll klassisku hittini fleiri nýggj løg, kanska verður høvi at hoyra nøkur av hesum í unplugged útgávum á konsertunum.

**nud**

# Góðska og 155 ára føðingardagur

ØLFRAMLEIÐSLA

- Tað hevur ofta verið sagt, at smakkurin á Restorffs øli kann vera eitt sindur varierandi. Fyri at kanna hetta málið til botns fór bryggjaríið undir eina systematiska smakking, hvørja ferð tappað varð í fleiri mánaðar. Tað vísti seg at eitt sindur av smakkmuni kundi koma fyri, serliga aftan á at nakað var frálíðið tappingardegnum. Hetta kom av, at eitt sindur av luft kom í fløskuhálsin beint áðrenn proppurin varð settur á. Oxigenið í lítlu luftmongdini reagerar við smakkievnini og man fær tað ein kallar »oxidering« ella »rugbreyðssmakk« sum tað eisini verður rópt. Soleiðis skrivar Restorffs Bryggjarí í tíðindaskrivi.

Teir á Restorffs Bryggjarí hava nú fingið útgerð, sum ger at eingin ilt ella luft er í fløskuhálsinum, áðrenn proppurin verður settur á.

- Hetta er nú nakrir mánaðir síðani, og úrslitið er ein jøvn og vælsmakkandi ølgóðska, sigur bryggjaríið.

Í sambandi við at bryggjaríið fyllir 155 ár í heyst fer útsølan við Landavegin hvønn fríggjadag í september at lata ein six pack ókeypis, tá ein kassi av øli verður keyptur.

Bryggjaríið fer eisini at lata eina ølsølu upp í Sundalagnum í næstum.

- Ætlanin er at koma við einum Classic øli í heyst, og í hesum sambandi fer starvsfólk frá bryggjaríinum at luttaka á The Scandinavian Brewery School sum er millum heimsins bestu skúlar, sigur bryggjaríið í tíðindaskrivi.

# Øll børnini í einari stovu



*Her síggja vit børnini hoppa í fríkorterinum*

**Í Dali eru bara 4 børn í skúlanum, tríggjar gentur og ein drongur**

SKÚLI
*Orð/mynd: Maria B Hansen*

**Dalur:** Vit tosaðu við tey og spurdu hvat tey plagdu at gera í fríkorterinum.

Tey søgdu at tey plagdu at hoppa band, krita, súkkla, tekna og nógv annað. So sjálvt um tey bara eru 4 børn so hugna tey sær allíkavæl.

Vit høvdu eisini eitt prát við lærarinnuna, og hon segði, at tað hava eisini verið minni enn bara fimm børn, og at tað onkutíð hava verið tvær gentur. Øll børnini hava somu stovu, frá fyrsta flokki til sætta flokk.

Tá tey eru liðug í fimta flokki flyta tey til Meginskúlan á Sandi, har tey so ganga til 10. flokk.

# Reyði Krossur og ódnin Katrina



TÍÐINDASKRIV
*frá Reyða Krossi Føroya*

Reyði Krossur Føroya hevur fylgt við í arbeiðinum hjá Reyða Krossi í USA.

Saman við hinum norðurlendsku feløgunum.

Semja er um, at tað í løtuni ikki skal setast nøkur innsavning í verk til hjálpararbeiðið, men eru tað tó onkur í ynskir at hjálpa við peningi, ber til at senda hesar beinleiðis. Um hetta eru upplýsingar á heimasíðuni www.redcross.org

Eisini ber til at flyta pening til eina konto hjá Reyða Krossi Føroya og viðmerkja »hjálp til USA«, so senda vit peningin víðari.

Um hjálp annars ynskist úr norðanlondum, fáa vit seinri at vita, men 7 fólk frá Norsk Røde Kors eru farin at hjálpa við »logistik«, eftir ynski frá USA

Tað eru fólk í Føroyum, sum hava verið órógvað, tí tey ikki frættu frá næstringum í kreppuraktа økinum. Til ber at eftirlýsa næstringar á heimsíðuni www.familylinks.org, har upplýsingar eru um, hvussu tú skalt bera teg at, men minnist til, at tað er aftirlýsarin, sum eisini skal avlýsa, tá samband er fingið í lag.